## Skúlaskip onga hjálp

Tey, sum varða av danska skúlaskipinum ”Danmark”, hava ætlanir um at senda skipið á eina ferð kring Jørðina. Millum annað er ætlanin, at skipið skal vera í Beijing, tá olympisku summarleikirnir verða har í 2008. Ferðin er mett at kosta 14 mió. krónur, meðan hóast stigtakararnir hava fingið nógv rós fyri hugskotið, er áhugin fyri at stuðla ætlanini so sum so. Hóast nógvar umsóknir um stuðul hevur skipið bara fingið eina hálva mió. krónur.

## Martin hugleiðir

Í annaðkvøld, týskvøldið, fer leiðarin í Føroyahúsinum í Keypmannahavn, Martin Fjallstein, at at líta aftur um bak við hugleiðingum, sum hann kallar ”Eitt stutt tíðarskeið - ein fjølbroyttur skari. Heitið sipar til, at Martin hevur gjørt av at siga seg úr leiðarastarvinum í Føroyahúsinum eftir 11 ára starvstíð. Í hugleiðingunum fer hann millum annað at siga frá hendingarríkum árum við bæði frustrasjónum og løttum løtum.

# Stak friðarligt vikuskifti

**Tað eru boðini av løgreglustøðini, har rapportin einans var tíggju síður long. Og tað sum fylti hana vóru smáting. Stuldur, okkurt minni ferðsluóhapp, eldur í eini garasju, fullir menn og herverk á tveir bilar**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Bilurin fór sera illa, men kvinnan slapp snikkaleys, tá hon í bili sínum fór út av vegnum í hálkuni leygarkvøldið og mundi rent á Landsfjósið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað er onki óvanligt, at rapportin hjá løgregluni er 30 síður long eftir eitt vikuskifti. Í so máta var talan um eitt serstakliga friðarligt vikuskifti, har samlaða frágreiðingin var tíggju síður til longdar.

Stuldur, okkurt minni ferðsluóhapp, eldur í eini garasju, fullir menn og herverk á tveir bilar var tað, sum fylti mest í vikuskiftisrapportini.

### Ferðsluóhapp við Landsfjósið

Seinnapartin fríggjadagin ringdi ein maður í vesturbýnum í Havn og boðaði frá, at nakrir óbodnir gestir høvdu tikið tríggjar kassar av øl frá honum.

– Her hava vit so onkur spor og okkurt navn at arbeiða, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í morgun.

Nakað seinni fríggjadagin – um hálvgum sjeytíðina – fór ein bilur út av vegnum millum Kollafjørð og Hósvík, beint við Landsfjósið. Bilurin fór sera illa, men kvinnan í bilinum slapp snikkaleys.

### Eldur og fýrverk

Leygarnáttin var friðarlig og er millum lítið og onki skrivað í frágreiðingini frá midnátt og út eftir. Men tá klokkan var hálvgum átta leygarmorgunin var aftur boð eftir løgregluni.

Úr vesturbýnum í høvuðsstaðnum vóru fólk vaknaði við kaldan dreym, tá ein hvøllur brestur brádliga var at hoyra. Fólk fóru at hyggja hvat hetta mundi vera og gjørdust tá varug við, at eldur var í eini garasju. Maðurin, ið átti garasjuna, sløkti sjálvur eldin við einum eldsløkkjara.

– Her bera nærri kanningar á tað borðið, at onkur hevur tveitt fýrverk inn í garasjuna, sum so er orsøk til eldin, verður sagt av løgreglustøðini, har tey arbeiða víðari við málinum.

### Kundi verið klíptur av

Seinnapartin leygardagin fekk løgreglan, umvegis alarmsentralin, fráboðan um eitt ferðsluóhapp millum Kambsdal og Fuglafjørð. Trý fólk vóru í bilinum, tvey vaksin og ein 11 ára gamal drongur.

Bilurin fór niðan av vegnum og inn í eitt berg. Annað av teimum vaksnu breyt beini og hitt fekk heilaskjálvta, meðan drongurin, sum sat óbundin á baksetrinum, slapp uttan stórvegis mein. Hetta var ómetaliga væl sloppið, tí drongurin varð slongdur út í gjøgnum síðurútin, men ikki tí megin har bergið var. Hevði tað verið støðan, hevði drongurin helst verið klíptur av, tá bilurin og bergið brustu saman.

Tríggir sjúkrabilar komu. Ein úr Eysturoynni og tveir úr Klaksvík, og var løgreglan úr Runavík og Klaksvík skjót á staðið. Eitt frálíkt dømi um, hvussu gott tað er at samferðslunetið er so væl útbygt.

Seint leygarkvøldið fekk løgreglan í Havn eina fráboðan um stuldur við Kioskina uppi undir Varða í Havn.

– Har høvdu nakrir ótangar tikið fløggini, sum hingu uttan fyri, men 17 minuttir eftir at vit høvdu fingið fráboðanina, hingu fløggini aftur har tey skuldu. Okkara menn vóru úti, og sóu dreingirnar við fløggunum í býnum. Fløggini vóru sett upp á pláss aftur, og so verður ikki meiri gjørt burtur úr tí, sigur vakthavandi.

### Friðarlig nátt

Sunnunáttin var friðarlig. Løgreglan vakti nøkur full fólk, sum lógu og svóvu í býnum, men annars hevði løgreglan ikki so nógv at takast við, sum eina vanliga sunnunátt.

– Kanska eru tað onkur, sum hava gjørt nøkur nýggjárslyftir, heldur vakthavandi skemtandi fyri.

Sunnumorgunin ringdu tey á Farstøðini og vildu hava løgregluna oman.

– Har svóvu nøkur full fólk, og vit noyddist tí oman at reka á dyr, sigur løgreglan, sum leggur aftrat, at hetta er við at vera ein afturvendandi trupulleiki.

Sunnudagin fekk løgreglan eisini fráboðan um herverk á tveir bilar, har speglið á tí eina var brotið av, meðan onkur hevði sparkað inn á síðuhurðina á hinum bilinum, sum so hevði fingið eina buglu.

Hetta er í høvuðsheitum tað, sum stendur í tíggju síðu stuttu frágreiðingini hjá løgregluni í høvuðsstaðnum, sum samanumtikið hevur havt eitt stak friðarligt vikuskifti.

## Fongslaður í Keypmannahavn fyri rúsevnissmugling

Ein 25 ára gamal føroyingur varð leygardagin varðhaldsfongslaður í Keypmannahavn, skuldsettur fyri at hava smuglað rúsevni til Føroya.

Dómarin gjørdi av, at maðurin skal sita í varðhaldi í seks dagar, og sum skilst verður hann sendur til Føroya.

Sambært ákæruvaldinum hevur maðurin sent rúsevni við postinum til Føroya, og løgreglan sigur hann hava smuglað 400 ecstasytablettir til tveir persónar í Føroyum síðani august í fjør. Løgreglan veit, hvørjir teir báðir móttakararnir eru.

Grundlógaravhoyringin í Keypmannahavn í dag var fyri afturlatnum hurðum, men sambært TV2 noktaði maðurin seg sekan og kærdi avgerðina um varðhald til landsrættin.

Í morgun var onki nýtt at frætta í málinum, tá vit spurdu á løgreglustøðini í Havn.